# HJÁLP *EINUM* BARNI!

## Bert 5,75 kr. um dagin



Tú kanst hjálpa einum barni í eini fátækari filippinskari familju at fáa skúlagongd og at koma í ein sjúkrakassa við at tekna teg sum sponsor hjá Føroysku Filippinsku Tænastuni fyri 175 kr. um mánaðin.
Skap vón fyri betri framtíð - gev 5,83 kr. dagliga. Tað er ein góð gerð hvønn dag!

**Upplýsingar um títt barn**
Sum sponsor av einum barni fært tú mynd av tínum egna sponsorbarni og navn, føðingardag og upplysingar um familjuna. Bert ein sponsor er til hvørt barn.

**Tíðindaskriv um arbeiði**
Minst eina ferðir um árið fært tú FFT-Tíðindi, við frásøgn um hvussu tað gongur við arbeiðinum á Filippinunum. Greinar eru eisini um Filippinurnar í FFT-Tíðindum.

**Hav samband við barnið**
Tú kanst skriva til barnið, og teirra brøv verða umsett til enskt frá ilocano (teirra máli).
So lærir tú familjuna og barnið enn betur at kenna.
Tú kanst eisini geva føðingardagsgávur og jólagávur til barnið ella familjuna.

**Góð ávirkan á framtíðina**
Ein skúlaleiðari skrivaði hetta um hjálpina frá sponsorunum: „Hjálpin er ikki bert nú, men hevur ávirkan á alla framtíðina hjá teimum. Tykkara hjálp gevur børnunum ein stóran møguleika fyri eini betri framtíð og betri útbúgving, sum minni heppin foreldur ikki kunnu geva sínum børnum.“

**NÚ kanst tú hjálpa!**
Vit heita á teg um at hjálpa einum barni.
Skúlagongd er ikki ein sjálvfylgja fyri hesi børnini. Tey leingjast eftir at onkur hjálpir teimum!
Nú hevur tú møguleika at byrja at hjálpa einum barni at læra at lesa, skriva, rokna og at hoyra um Jesus!
HJÁLP EINUM BARNI við at skriva á lepan niðanfyri.
Tak eina góða avgerð.
**Tekna teg *NÚ!***

**FØROYSK FILIPPINSK TÆNASTA** stovnað í 1990 av føroyingum hevur kristið sosialt neyðhjálpar- og menningararbeiði á norðaru helvt av Luzonoynni á Filippinunum.
Vit arbeiða serliga við at útvega sponsorar til fátækar familjur, so at sponsorarnir gjalda fyri skúlagongdina hjá einum barni í familjuni. Vit hava gott og regluligt samband við skúlarnar, og bert tey, sum ganga í skúla og ikki kunnu gjalda fyri seg, verða stuðlað av okkum soleiðis. Tín hjálp sum FFT-sponsor gerst munagóð, persónlig, ítøkilig, áhugaverd og spennandi.

# # 

***JA**, eg vil vera sponsor*

fyri ___ barn/børn á Filippinunum.

Mynd, navn og føðingardagur og stutt familjufrágreiðing verða send til mín.
Eg flyti ___ x 175 kr. hvønn mánaða á konto 45 77 77.0 í Føroya Banka.

Navn ______________________________
Adressa ______________________________
Býur/bygd ______________________________
Tlf ________ & __________ Fax ______________
Teldupost ______________________________

Send seðilin til: Føroysk Filippinsk Tænasta, 180 Kaldbak.

*Fleiri upplýsingar á tlf. 312978 Petur Oluf Skorá*
*ella 075 509 509 Martin Reinert*